Jósef: Vit hava ferðast bæði langt og leingi og hava onga staðni at vera. Hava tit pláss fyri okkum í nátt?

2. húsaeigari: Nei, vit hava longu fult hús, eg eri sera harmur um tað, men her kunnu tit ikki vera.

**Frásøgufólk**

Maria og Jósef mugu leita víðari. Tað er seint, og tey eru um at missa mótið, men tey mugu finna eitt stað at sova. Nú síggja tey eini fitt lítil hús, tað er ljós í vindeygunum. Tey fara yvir og banka á dyrnar.

3. húsaeigarin: Góðan dag! Hvaðani koma tit so seint, og hvat vilja tit her?

Jósef: Vit hava ferðast allan dag og eru ógvuliga móð, men vit hava ongastaðni at sova í nátt. Maria er ógvuliga troytt og er komin at eiga, vit mugu finna eitt stað at vera. Er nakað pláss hjá tykkum?

3. húsaeigarin: Nei, nógv fólk eru komin at búgva hjá okkum, nú øll skulu teljast, vit hava ikki pláss fyri tykkum.

Maria: Sum tað er keðiligt. Eingin hevur pláss fyri okkum, hvat skulu vit gera?

3. húsaeigarin: Bíða mær eitt sindur. Eg eigi eitt fjós, sum tit kunnu sova í. Tað er ikki stórt, men tit fáa tak yvir høvdið.

3. húsaeigarin fer yvir til fjósið og vísir teimum, hvar tey kunnu sova. Maria og Jósef fara inn og seta seg niður.

**Frásøgufólk**

Maria og Jósef fingu ikki annað at búgva í enn eitt fjós. Men hesa náttina átti Maria ein lítlan drong. Har var smáligt, eingin hugnalig vøgga at leggja hann í, so hon legði hann í eina krubbu við hoyggi. Drongurin fekk navnið Jesus.

Maria leggur eina dukku í eina „krubbu“.

**Frásøgufólk**

Tá ið Jesus var føddur, hendi nakað løgið. Tætt við Betlehem sótu nakrir hirðar og ansaðu seyði. Brádliga lýsti øll luftin, hóast tað var mitt um náttina. Teir hoyrdu eina rødd.

Eingilin: Tit skulu ikki vera bangnir, tí tykkum er í dag frelsari føddur. Hann er sendur í heimin til tykkara, og hann skal læra tykkum at vera góð hvørt við annað.

**Frásøgufólk**

Og enn fleiri einglar komu.

Einglarnir koma inn.

Einglarnir: Heiður verið Gudi í hægsta himni. Friður á jørð og í menniskjunum góður tokki.

Eingilin: Tit skulu finna eitt barn í eini krubbu.

**Frásøgufólk**

Hirðarnir fara til gongu yvir til fjósið og leggja seg á knæ framman fyri krubbuni.

Sangur: „Fagur himin er at sjá“ av fløguni *Vinir mínir og eg.*